Tíðindablaðið
**sosialurin**

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritøkusstjóri: Kristian Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Randi Jacobsen - Dagny Joensen - Jústinus L. Eidesgaard - Eyðun Klakkstein - Eiríkur Lindenskov - Áki Bertholdsen

Útgevari, uppsetting og prent: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegi 20 Argjum

Postadr.: Postsmoga 76 110 Tórshavn
Telefon: 11820
Telefax: 14720

Internet: http://WWW.cybernet.dk/[illegible]
e-mail: sosialur@olivant.fo

# Skilagóður undirgrundarpolitikkur

## *Oddagrein*

TAÐ var ein skilagoð avgerð, sum tingið tók, tá tað gjørdi av at geva loyvi til kanningar av føroysku undirgrundini. Tey úrslitini, sum fyriliggja av hesum kanningum, tykjast nú at koma okkum til hjálpar í einum øðrum stór- og alvarsmáli, nevniliga marknaðsemjuni við Bretland - um so er, at meting okkara er røtt.

TAÐ kom rættiliga óvart á okkum, tá bretar fyri nøkrum árum síðani bráddliga gjørdu krav uppá ein stóran part av landgrunninum, onkunstaðni heilt inn at klettinum. Hesi krøv komu um nøkunlunda somu tíð, sum eitt fyrrverandi almen bretskt oljufelag, BP fann stórar oljukeldur beint við føroyska markið. Tá Sosialurin fyri nøkrum árum síðani setti bretska samráðingarleiðaranum, David Anderson, spurningin, um ikki samband var millum bretsku krøvini og ta nýggju vitan, sum bretsk oljufeløg høvdu um økini nær Føroyum, vísti hann hesum aftur. Tað er tó okkara meting, at her var eitt samband, og tað fer at koma fram ein dag.

FØROYINGAR hava - og tað hevur verið rætt - valt ikki at slaka fyri bretsku krøvunum. Í dag síggja vit, hvussu skilagott tað var, at vit ikki lótu okkum ræða av pástandinum um, at oljufeløgini fóru at venda okkum bakið, um ikki ein skjót semja varð gjørd við bretar um markið. Sjálvandi vónaði bretska stjórnin, at henda ræðumyndin fekk fastar tøkur á okkum og fekk okkum at skriva undir eina semju. Tað gjørdi hon ikki. Um somu tíð sum vit hildu fast um, at miðlinjan er undirgrundarmark, góvu vit so útlendskum oljufeløgum loyvi til at gera kanningar. Og okkara oljumyndugleikar gjørdu rætt, tá teir settu sum treyt fyri kanningunum, at tær skuldu ikki bert fevna um tey tá mettu mest spennandi økini við markið. Kravið var, at eisini onnur øki við Føroyar skuldu kannast.

Í dag síggja vit so úrslitið av hesum skilagóða olju- og marknapolitikki. Nú koma kanningarúrslitini hjá oljufeløgunum okkum bráddliga til hjálpar í marknastríðnum við bretar. Hesar seinastu dagarnar hava umboð fyri tvey stór oljusamtøk, ið hava verið sera virkin á føroyskum øki, t.e. AMG-samtakið og Amerada bólkurin, greitt frá, at føroyingar nýtast ikki at bera ótta fyri, at ein framtíðar oljuútviklingur skal vera bundin at teimum sokallaðu umstríddu økjunum. Kanningarnar vísa, at nógva staðni á føroyska landgrunninum og eisini uttan fyri tey umstríddu økini, eru góðir møguleikar at finna olju og gass. Tvs. at vit eru bráddliga sloppnir úr teirri spennitroyggju - tí hana - sum vit hava verið í mótvegis Bretlandi, har tað mestsum bara hevur snúð sum um oljuútlit báðumegin markið.

UM so er, at okkara niðurstøðu er røtt, so kann ikki sigast annað enn, at vit í hesi so týðandi fasuni av oljuútviklinginum hava borið okkum rætt at. Filosofiin um at brúka ta neyðugu tíðina til samráðingarnar og ikki leypa framav fyri løtuvinnings skyld og undir trýsti hevur verið røtt. Tí standa vit í dag við nógv betur kortum í hondini mótvegis bretum enn fyri bert fáum árum síðani. Løgmaður og eitt samt bakland hava ríkið rætta politikkin. Nú nýtast vit nevniliga ikki at ganga uppá akkord longur og bera ótta fyri, at oljufeløg heldur fara aðrastaðni orsakað av eini óloystari marknatrætu. Tað er tí eitt skilagott taktiskt útspæl, tá oljumyndugleikarnir nú biðja oljufeløgini fyribils bjóða uppá økini við Føroyar. Hetta kann vera enn ein góður trumfur í hondini hjá okkara samráðingarfólkum.

VÍSIR tað seg, tá freistin er úti tann 5. desember, at nógv oljufeløg vilja gera íløgur í føroyskum øki uttan mun til, um marknatrætan er loyst ella ikki, tá hava drúgvu samráðingarnar ikki verið til fánýtis. Vit sanna tá orðini hjá samráðingarleiðaranum, Árna Olafsyni: heldur eina góða loysn enn eina skjóta loysn. Teoriurnar hví danir „góvu" okkum undirgrundina eru nógvar. Her er so enn ein! Við at fáa gongd á oljuleitingina skuldu so møgulig positiv úrslit á føroyskum øki seta okkum í eina betri støðu mótvegis bretum í samráðingunum og eisini forða okkum í at taka eina ov skjóta avgerð, sum bara bygdi á avmarkaða vitan.

*Sosialurin*

## Lesarabrøv

# Suðuroyar sunnara helvt í læknaloysi

Meðan læknar og sjúkrasystrar keglast norðuri í Havn um leiðsluháttin á Landssjúkrahúsinum, ræður tann fullkomni ruðuleikin á læknaviðurskiftunum í Suðuroyar sunnaru helvt.

Hóast ávaringar frá læknum um at støðan skjótt kundi gerast tann, at eingir læknar fást til útjaðaraøkini í Føroyum, so hava ávvarðandi myndugleikar ikki latist um vón. Ongar átøkur eru gjørdar til tess at fáa læknarnar at støðast, og úrslitið er tí vorðið hareftir.

Ein lækni fyri og annar eftir sigur seg úr kommunulæknastarvi sínum, og seinasta dømi í so máta er kommunulæknin í Vági, Óli Bech, ið hevur fingið starv á donskum sjúkrahúsi. Hetta hevur so ført við sær, at í dag hava vit ongan kommunulækna í Suðuroyar sunnaru helvt.

»Meðan eingin lækni er í Vági, verður víst til læknarnar á Tvøroyri«, hesi eru boðini ið telefonsvararin í læknaviðtaluhølinum í Vági gevur viðskiftafólkunum, tá ringt verður til lækna. Soleiðis statt eru vit suðuringar sunnan fyri Hovseggj fluttir nógv ár aftur í tíðina, tá um læknahjálp ræður.

Meðan Útvarpið og bløðini nærum tíma fyri tíma hava fylgt gongdini á Landssjúkrahúsinum tykist tað ikki sum um hesir fjølmiðlar hava sama áhuga fyri læknaviðurskiftunum í øðrum pørtum av Føroyum. Okkurt hissini prát við fyrrv. kommunulækna hevur tó verið, men einki hevur verið gjørt at fáa uppspurt, hví ongar átøkur verða gjørdar á læknaumstøðurnar úti um landið.

Frá ávvarðandi myndugleikum í Havn verður sagt, at ein nevnd arbeiðir við at endurskoða kommunulæknaskipanina. Henda nevndin hevur nú sitið og tugt yvir hesum máli í ára vís, meðan læknadømini runt landið tømast fyri kommunulæknar.

Eins og øll onnur kunnu vit ið, búgva í Suðuroyar sunnara helvt, gerast sjúk, eins og onnur kunnu vit eisini hava tørv á skjótari læknahjálp, og tað eigur at verða ein tryggjaður rættur í einum nútíðarsamfelagi, at fólk hava møguleikar at venda sær til egnan lækna.

Vit eru borgarar í hesum samfelagnum við somu skyldum, men eisini við somu rættindum, sum aðrir føroyingar. Tí krevja vit at Heilsuverkið tær skil á læknaviðurskiftunum í Suðuroyar sunnaru helvt, beinanvegin.

**Dánjal Hjarkhamar**

# Opið bræv til Pál Weihe

13. august 96 fekk eg eina dóttir á Landssjúkrahúsinum. Av tí at barnið var ov tíðliga føtt, var annar av teimum báðum barnalæknunum tað mesta av tveimum samdøgrum hjá hesum barni, líka til hon var komin á Ríkissjúkrahúsið.

Tá noyddist barnalæknin at fara at sova, tí hon hevði vakt hjá barninum í meira enn 48 tímar, og aftaná skuldi hun í feriu.

Hví eg stigi alment fram í bløðunum fyri at siga frá hesum?

Ju, tí sami lækni hevur frá 1. januar biðið um farloyvi, og ikki er søkt eftir øðrum barnalækna í staðin. Eftir í Føroyum verður tá ein barnalækni, sum umframt at skula røkja vanligu barnadeildina við børnum innløgd við infektions- og virussjúkum, børnum við krabbameini, hjarta-, maga- og tarmsjúkum, brokk og lungnasjúkum, eisini skal taka sær av t.d. børnunum við D.A.M.P., børnum við psykiskum trupulleikum o.s.v.

Eisini skal sami lækni vera á føðideildini og gera tær vanligu fyribyrgjandi kanningarnar av nýføðingum. Og er tað ein torfør føðing, skal hann vera hjástaddur og vera hjá ov tíðliga føddum børnum ella børnum við hjartafeili, sum beinanvegin skulu flytast á Ríkissjúkrahúsið. Harafturat kemur so tað uppfylgjandi arbeiðið við P.C.B. kanningunum.

Ein lækni hevur vanliga átta tímars arbeiðsdag og rætt til frígongu og feriu.

Fyri mær at síggja merkir hetta, at tú ikki trygt longur kann føða á sjúkrahúsinum í Havn. Har eru læknar, men ikki barnalæknar. Tað fer eisini at hava við sær, at fleiri børn enn nú verða flutt á Ríkissjúkrahúsið, og familjur við smábørnum kunnu í longri tíð ikki vera saman. Tað verður sagt, at børnini eru Føroya gull. Um so er, er prísurin á gulli ógvuliga lágur.

Mitt bræv skal eisini skiljast sum ein innilig áheitan á foreldur um at taka undir við kravinum um at fáa sømiligar umstøður á barna- og føðideildini á Landsjúkrahúsinum.

**Nina Dahl**
Ovaragøta 62
188 Hoyvík

# Stunder med Rabarbara

Á Reyni, 3.10.96

Nu, da undertegnede, har haft hyggelige oplevelser, i forbindelse med film optagelserne, vil jeg gerne, som eneste beboer på Tinganes henlede opmærksomheden på de forhold, der råder på Tinganes.

Fuldstændig uforståelige forhold, på vegne af ham fra Osterø, Hildubergs afsky for de århundrede gamle bygninger på Næsset, har inspireret til disse bogstaver.

Nu da filmoptagelserne har taget en ende, og man føler at nu er 18. århundrede ved at blive væk igen, er det med et vist vedmod man iagttager, at man er ene igen. Filmfolkene, der fyldte så meget, blev væk!

Den spidtost tænkende »forstjori« på Næsset, (nøvrigt fra Osterø), har gjort det til sit livs opgave, at affolke Næsset. Og det på den grusomme facon, at alle beboerne er flyttet på grund af kulde, (antydigt med at Portugalið), der i forgangne tider havde ca. 30 beboere, nu huser en arkitekt, samt hendes skriver.

Alle de øvrige huse, de er 6 i alt, er ubeboede, undtagen Skansagarður, der er befolket med en kaffe-klub, kaldt Kiwanis. 1000 kr om måneden med olje og belysning!

I min alenehed, vil jeg derfor gøre opmærksom på at jeg ikke synes, at »forstjorins« bygdeslige natur, er særlig velkommen på Næsset. Alle disse huse, der rummer så megen historie, varme og hygge, ligger nu som et skændsel, særdeles i betragtning af, at det nok er Nord-Atlantens mest attraktive museum.

De 5 mennesker, der beboede Kákahuset, Futahuset, Juul Olsens etc. er alle flygtet, da de ikke har fået mulighed for at få lagt ind, den fjernvarme, som er dimensioneret og afiet at skulle forsyne nævnte huse.

En stor skam, at en person (fra Osterø) sådan med sin bemyndigelse, kan lægge sin kolde hånd over et af verdens hyggeligeste kvarterer, og af folke nabolaget, bare på grund af sin enfoldige facon!

**Michael Muller**

heim – ella út í heim
*tað greiða vit...:*
033 32 75 85 Svarar ALT SAMDØGURIÐ
BLUE ATLANTIC
FØROYAFERÐIR
Vester Farimagsgade 4-6, 1606 København V
Tlf. 33 32 75 85 Fax 33 32 75 80